# Fólkið skal døma mín tónleik

**- Eg taki mær ikki av tí, tá ið kritikarar finnast at mínum tónleiki. Fólkini, sum keypa og lurta eftir mínum tónleiki, eru røttu dómararnir, sigur Johnny Logan, sum hevur konsert í Havn í kvøld**

JOHNNY LOGAN

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

- Eg eri íri, men eg eri føddur on the road.

Tað sigur 53 ára gamli Johnny Logan, sum í dag vitjar í Føroyum, her hann skal hava konsert í Norðurlandahúsinum í Havn.

- Pápi mín var tónleikari, og eg havi ferðast nógv. Eg eri íri, men eg eri faktiskt føddur í Australia, og beiggi mín er føddur í Skotlandi, sigur hann.

At Logan er íri hoyrdist aftur, tá ið hann vitjaði á Rás 2 í morgun.

- Tá ið eg var í Føroyum seinast, mátti tú vera limur í einum ølklubba fyri at fáa eina øl. Tað skilti eg einki av. Nú er tað broytt, og eg eri eisini broyttur, tí eg drekki ikki longur, segði hann á rásini.

### Harra Grand Prix

Johnny Logan er serliga kendur sum vinnari av europeiska Tónleika Grand Prixnum. Hann vann kappingina fyrstu ferð í 1980 við What's Another Year, síðani í 1897 við Hold Me Now, sum er hansara størsta hitt, og síðani skrivaði hann vinnarasangin hjá Lindu Martin í 1992.

Johnny Logan er framvegis virkin tónleikari. Hann gevur tónleik út og er støðugt á ferð.

Seinasta útgávan hjá honum The Irish Connection hevur selt sera væl í Norðurlondum. Logan hevur fingið platin fyri søluna í Danmark og dupult platin í Noregi. Logan hevur seinnu árini eisini havt hitt í miðeuropa.

### Fólkið skal døma

Johnny Logan hevur ikki verið nakar favorittur millum ummælarar, men tað leggur hann lítið í.

- Eg taki mær ikki av tí, tá ið kritikarar finnast at mínum tónleiki. Fólkini, sum keypa og lurta eftir mínum tónleiki, eru røttu dómararnir. Tey kunnu veruliga meta um tónleikin og ikki tey, sum fáa pengar fyri at finnast at, sigur Johnny Logan.

Og fólkið sleppur at meta um og døma tónleikin hjá Logan, tá ið hann í kvøld spælir á jólakonsert í Norðurlandahúsinum.

Og mann hann ikki eisini fara at tríva í gomlu Grand Prix-slagararnar...



*Johnny Logan vitjar í Føroyum fyri fyrstu ferð í 18 ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




### PARTABRØVINI HILDU ÁFRAM AT HÆKKA

Partabrøvini í Evropa hækkaði triðju viku á rað og liggja 1,4% hægri enn fyri viku síðan. Hetta er bert 6% frá tí hægsta tey vóru undan lækkingini í juli. Hækkingin stavaði frá góðum lyklatølum m.a frá fleiri bíleggingum í USA. George Bush forseti legði eisini fram eina ætlan um, hvussu teir nógvu húsaeigarirnir, sum eru komnir í rasshaft av teimum sokallaðu sub-prime lánunum, kunnu umfíggja síni lán og harvið sleppa undan tvingsilssølu av húsum teirra.

Sum mett lækkaði Ongland rentuna. Hóast ECB ikki broytti rentuna var stjórin Trichet greiður. Sjálvt um búskaparligu árinini av lánikreppuni skulu takast í álvara, leggja teir størri áherðslu á vaksandi prísvøkstur í Evropa sum komandi ár fer at liggja yvir málið hjá ECB. At fleiri limir í ECB høvdu mælt til at hækka rentuna, ger sítt til, at marknaðurin væntar eina rentuhækking í Evropa.

### ATLANTIC AIRWAYS SKRÁSETT

Mánadagin var Atlantic Airways skrásett. Kursurin liggur í dag á 263. Tekningarkursurin var 261. Kaupthing Bank hevur keypstilmæli á Kaupthing.fo.

### RENTAN HÆKKAÐI

10 ára danska lánsbrævarentan hækkaði brádliga fríggjadagin og hon liggur á 4,38% sum er 0,20% hægri enn fyri viku síðan. At rentan hækkaði, kann stava frá arbeiðsmarknaðartølunum úr USA sum hóast tey gjørdust eins og mett, benda á at amerikanski búskapurin hevur tað frægari enn óttast var fyri. Hetta fekk íleggjarar at venda eyguni frá láni– og bústaðarkreppuni eina løtu og leggja størri dent á prísvøksturin, í staðin fyri vandan fyri steðgi í altjóða búskaparvøkstrinum. Rentan er tó framvegis lág . Hetta er tí eitt gott høvi hjá lántakarum at læsa rentuna fasta.

### HESA VIKUNA

Tað ið kann ávirka fíggjarmarknaðirnar hesa vikuna er rentufundurin í FED ídag. Marknaðurin er ósamdur um rentan verður lækkað 0,25% ella 0,50%. 2/3 meta at rentan niður í 4,25%. Týska ídnaðarálitistalið ZEW kemur ídag. Hósdagin verða tøl fyri smásøluna í USA avdúkaði, meðan brúkaraprísirnir verða kunngjørdir fríggjadagin.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1397,84 | + 3,24% |
| Alheims partabrøv | 8327,06 | + 3,43% |
| Atlantic Petroleum | 1838,00 | + 2,4% |
| Føroya Banki | 190,00 | -3,55% |
| Eik Banki | 535,00 | + 2,88% |
| KB Trygg Eurostoxx | 111,57 | + 2,38% |
| USD | 507,16 | + 0,37% |
| JPY | 4,54 | -1,26% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

**Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo**

KAUPTHING BANK